# Sólarmamman sløkti

**– Tað var fantastiskt at fara heim og vera frísk. Tú ynskir at trúgva tí, men tað liggur kortini alla tíðina og lúrir – torir tú veruliga at trúgva tí? Eisini hóast tú við tíðini fær tað upp á avstand, koma tíðir, har tú ivast. Lívið er dýrabart – eg takki fyri hvønn morgun, eg vakni**

KRABBAMEIN
*Brynhild Høgnadóttir*



*Birgit við Sandá, sum fekk krabbamein men gjørdist frísk*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jólaaftanskvøld 2003. Dunnuroykur og jingle bells. Møðgurnar, tvær vaksnar gentur og mamma teirra standa í baðiverilsinum og gera seg klárar til jólahugnan. "Mamma, vart tú hjá lækna, og fekst móðurmerkið kannað, sum tú lovaði í summar?" "Nei." Vónbrot og grátur.

Móðurmerkið á bakinum var elalítið og blásvart og skriðaði at kalla slettis ikki. Við tað at tað eru tey fæstu, sum hava yvirlit yvir húðina á bakinum, hevði Birgith við Sandá, nú 55 ár, ikki sjálv givið merkinum gætur. So tað var ikki fyrrenn dótttirin sá tað, hon hugsaði um tað.

Í sínum ungu døgum hevði Birgith sjálv solariusalong. Hetta var í 80'unum, tá tú skuldi vera brún, fyri at síggja væl út – og hetta helst alt árið. So solariusalongin varð dúgliga brúkt – eisini av Birgith sjálvari, bæði vetur og summar. Lítið og einki var at hoyra um vandar í hesum sambandi, og at doyggja av tí var rætt og slætt úrtøkiligt at ímynda sær. Hoyrdi hon onkran tosa um vandan við solarium, hugsaði hon: "Á, tað mann ikki vera so vandamikið kortini". Birgith hevur reyðbrúnt hár, og hevur ikki tað bleika, frøknuta húðarslagið sum eyðkennir norðbúgvar, so hon mundi um nakar tola solarium.

Á baðiverilsinum fyri skjótt fimm árum síðani lovaði Birgith enn einaferð at fara til lækna.

- Eg mátti lova teimum at fara til kanningar, tí sum tær søgdu, "vit vilja ikki missa teg, mamma." Visti ikki, at tær hildu hetta vera so álvarsligt. So eg lovaði teimum, at fyrsta dagin læknaviðtalan læt upp eftir jólafrítíðina, skuldi eg ringja og biðja um tíð. Læknin helt heldur ikki, at tað sá alarmerandi út: "Birgith, hatta sær púra harmleyst út, men tað er tín avgerð. Vilt tú hava, at eg taki tað, so geri eg tað." So tað varð lagt upp til mín. Hetta er hugvekjandi, og eg havi síðani hugsað, at tá tað kemur til móðurmerki, er umráðandi, at ein sjálv ikki er ov myndugleikatrúgv, men hinvegin setir krav um at fáa illgrunasom móðurmerki tikin. Eg bað hann taka tað burtur, tað hevði eg jú lovað familjuni at gera, og hann so gjørdi. Hann segði mær, at eg kom at hoyra aftur um einar tvær vikur, tí tað skuldi sendast niður til kanningar. Tá eg var farin út frá læknanum, gloymdi eg alt um tað. Nú hevði eg gjørt, sum familjan ynskti, so nú vóru øll glað. Eg var sannførd um, at mær feilti einki.

## Ófrættaboð

Tað gingu góðar tvær vikur. Birgith sat inni í stovuni, tá tað bankaði uppá, og har stóð sjálvur kommunulæknin.

- Eiheldur tá ringdi nøkur klokka hjá mær – tað var so hugnaligt, at hann kom. "Birgith, eg havi tíverri ikki góð boð at bera tær. Hatta var illkynjað, har var krabbamein í móðurmerkinum. Vit noyðast at senda teg víðari." Eg fór at frætta aftur

> *- Tað er syndarligt at síggja hesi ungu solariubrún. 14-16 ára gomul hugsa ikki um at tað kann vera vandamikið at taka sól. Aldursmark á 18 ár eigur at verða umhugsað.*

frá sjúkrahúsinum. Tað var so undarligt. Eg hoyrdi, at hann tosaði um krabbamein, men tað var ikki meg, hann tosaði um. Eg tosaði við hann um ymiskt fyrifallandi, og fór at gera kaffi. Tá hann fór, spurdi hann, um hann ikki skuldi sjúkramelda meg. Eg noktaði, eg skuldi til arbeiðis morgunin eftir, mær feilti jú onki.

- Tá eg legði høvdið niður á koddan sama kvøldið, reageraði eg. Hann hevði sagt, at eg hevði krabbamein! Eg fór at skelva og fekk ein ræðuligan skelk. Maður mín mátti halda um meg, og tað var vónleyst at sova. Eg fór upp at vaska og strúka klæði, og rokaðist alla náttina. Fór kortini til arbeiðis á sjúkrahúsinum eftir eina svøvnleysa nátt. Stutt eftir eg var komin til arbeiðis ringdi læknin av sjúkrahúsinum, at hann hevði fingið boðini, og bað meg koma inn til eina samrøðu. Hann bað meg eisini vera púra róliga, tí teir helst longu høvdu fingið allan krabban burtur, tá móðurmerkið var skorið burtur. Men hann segði eisini, at tað mark er sett, at um tað er yvir 1 millimetur skal ein kannast nærri í sjúkrahússkipanini. "Hjá tær er tað akkurát farið upp um, tað er 1,05, tí má eg senda teg víðari. Um tú vart undir 1, hevði einki verið gjørt." Hann lovaði at fáa meg víðari so skjótt sum gjørligt.

## Verið jalig

Frá tá av megnaði Birgith ikki at arbeiða, og varð sjúkrameldað. Maðurin og hon gjørdu av, at tey skuldu biðja børnini koma heim eitt í senn.

- Hetta var tað ringasta, sum eg havi verið úti fyri í lívinum. At skula siga mínum børnum frá hesum var so nógv verri, enn at fáa at vita, at eg hevði krabbamein. Men eg bønaði tey um at vera positiv, tí eg hevði valt at trúgva, at eg var frísk og fór at verða verandi frísk. Eg bað tey hjálpa mær at vera positiv. Ikki tosa negativt og ikki vera ólukkulig. Men dagarnir vóru ringir at koma ígjøgnum. Ein dagin lá eg á sofuni, og hevði onga megi til nakað. Tann elsta dóttirin kom inn, og segði við meg: "Mamma, ert tú um at fáa eina depression?" Tey orðini slógu meg